# Frágreiðing frá Sjóvinnustýrinum um hending, tá ið Reynsmúli og Neshamar stoyttu saman í Djúpinum hin 15-11-2010

*Frágreiðingin er bygd á útsagnir frá bátsførarunum á Reynsmúla og Neshamri.*




**Mynd MB Reynsmúli**

(Mynd vantar)

**Mynd MB Neshamar**

**Sjóvinnustýrið . P.O. Box 26 . FO-375 Miðvágur . Faroe Islands .**
**Tel +298 355600 . Fax +298 355601 . fma@fma.fo . www.fma.fo**

# Vanlukkufrágreiðingar

Sjóvinnustýrið hevur ábyrgdina av at kanna vanlukkur/ óhapp og álvarsligan fólkaskaða, ið eru farin fram á sjónum.

## Endamál

Endamálið við kanningini er at útvega upplýsingar um vanlukkur/óhapp og at fáa greiðu á tilburðargongd og orsøkum, ið hava við sær, at vanlukkur/óhapp henda. Hetta til tess, at Sjóvinnustýrið kann taka neyðug stig til at minka um vandan fyri at tílíkar vanlukkur/ óhapp henda aftur.

Sjóvinnustýrið hevur onga ávirkan á møguligar revsirættarligar- ella endurgjaldsspurningar í sambandi við vanlukkur/óhapp.

Starvsfólk Sjóvinnustýrilsins og onnur, ið luttaka í kanningunum, hava tagnarskyldu í øllum málum um vanlukkur/óhapp á sjónum, meðan málið verður kannað.

## Fráboðanarskylda

Álvarsligar vanlukkur á fiskiskipum ella handilsskipum skulu fráboðast sambært kunngerð nr. 713 frá 11. novembur 1987. Oyðubløð eru tøk á heimasíðuni hjá Sjóvinnustýrinum: www.fma.fo.

Oyðublað skal fyllast út og sendast til:

**Sjóvinnustýrið,**
**Postboks 26,**
**370 Miðvágur,**
**T-post:** fma@fma.fo
**www.fma.fo**

# Samandráttur

M/B Neshamar og M/B Reynsmúli stoyttu saman í Djúpinum 15.11.2010. Neshamar var ávegis til Fuglafjarðar ímeðan Reynsmúli var ávegis til fiskiskap norðanfyri.

Neshamar fekk stóran skaða á bógvin. Mett verður, at hesin skaði leiddi til, at báturin sakk fáar minuttir eftir samanbrestin.

Stýriborðs bógvur á Reynsmúla bleiv trýstur nakað inn. Tó onki brot á skrokkin staðfest.

Einsamalla fólkið á Neshamri fall við stoytin í óvit, og bleiv eftir tilburðin bjargað umborð á Reynsmúla.

Viðkomandi fólk minnist einki til hendingina, -og minnist bert í brotum tíðarbilið komin umborð á Reynsmúla inntil komin á sjúkrahús.

Annars eingin fólkaskaði.

## Um bátarnar

| | |
|---|---|
| Skipanavn | **Reynsmúli** |
| Skrásetingarnr | FO-000107 |
| Havnakenningarnr. | KG 587 |
| Kallimerki | OW2376 |
| Heimstaður | Klaksvík |
| Skrá | Føroya Skipaskráseting |
| Slag | Fiskiskip |
| Eigari | Reynsmúli (Sp/f), Føroyar |
| Byggiár / skipasmiðja | 1960 / Raun Bybergs Skibsbyggeri A/S |
| Skrásett fyrstu ferð | 12-08-1985 |
| Byggitilfar | Viður |
| Bruttoregistartons | 49,30 |
| Nettoregistartons | 22,50 |
| Longd | 17,740 metrar |
| Breidd | 5,300 metrar |
| Dýpd | 2,290 metrar |
| Longd yviralt (LOA) | 19,200 metrar |
| Motorslag | Grenaa Motorfabrik A/S |
| Motororka | 221,00 KW |

| | |
|---|---|
| Skipanavn | **Neshamar** |
| Skrásetingarnr | FO-000568 |
| Havnakenningarnr. | FD 1144 |
| Kallimerki | XPF2093 |
| Heimstaður | Fuglafjørður |
| Skrá | Farskráin |
| Eigari | Oddbjørn Magne Neshamar |
| Byggiár / skipasmiðja: | Einki ásett / Einki ásett |
| Skrásett fyrstu ferð | 14-04-1992 |
| Byggitilfar | Trevjaplast |
| Bruttoregistartons | Einki ásett |
| Nettoregistartons | Einki ásett |
| Longd | 29,000 føtur |
| Breidd | 9,500 føtur |
| Dýpd | 3,500 føtur |
| Longd yviralt (LOA) | Einki ásett |
| Motorslag | Ford |
| Motortypur | einki ásett |
| Motororka | 62,56 KW |

# Tilburðurin

## Áðrenn samanstoytin

*Neshamar* var ávegis á Fuglafjørð, ferðin 6 míl. Eitt fólk umborð.
Sigldi í Djúpinum.

Hevði røktað goggurúsur undir Kallsoynni.

Einsamalla fólkið umborð hevði júst sitið í stýrihúsinum og etið. Áðrenn farið varð aftur á dekkið at vaska og rudda, bleiv kagað frameftir. Onki far at síggja.

Sjálvstýrarin var settur til.

Úti á dekkinum varð javnan hugt fram gjøgnum stýrihúsið -fram gjøgnum fremstu trý miðvindeygu, hetta til tess at røkja kagtænastu. Tó, her sum fólkið stendur í stýriborðs síðu á dekkinum, er minni blindur vinkul á bakborð.

*Reynsmúli* er ávegis á fiskileið norðanfyri, ferðin 7,5 míl. Fýra fólk umborð. Loyst var úr Klaksvík kl.14:10 og leiðin løgd yvir í Djúpini.

Bátsførarin er einsamallur á brúnni. Hinir umborð hvíla frammi í lugarinum hetta siglingina ávegis á fiskileið.

Sjálvstýrarin var settur til.

Komin nakað norður gjøgnum Djúpini sæst gulur trevjaplastbátur áleið 10 stig um stýriborð, fjarstøðan mett til skamt yvir hálvan fjórðing. Kósin bleiv broytt áleið 8 stig á bakborð, hetta fyri at víkja.

## Bátarnir stoyta saman

Áleið kl. 15:00 stoyta bátarnir saman. Neshamar siglir inn í stýriborðs bógv Reynsmúlar, skamt aftanfyri stevnið. Bresturin er harður, og bógvurin á Neshamri verður illa skaddur.

Á Reynsmúla verður tikið frá og bakkað.

Alt ímeðan Neshamar fer aftur við stýriborðs síðu, sær bátsførarin á Reynsmúla mann liggja undir línurulluni á Neshamri.

Teir tríggir menninir, sum vóru í lugarinum koma upp í stundini.

## Eftir samanstoytin

Beinanvegin eftir samanstoytin byrjar framendin á Neshamri at søkka, samstundis hevur báturin framvegis framdrift.

Reynsmúli vendir beinanvegin, og eltir Neshamar við fullari ferð. Tá fjarstøðan er størst, er í mesta lagi ¼ fjórðingur millum bátarnar.

Ferðin rennur so líðandi av Neshamri, og tá Reynsmúli leggur upp at síðuni er eingin framdrift. Framendin er undir, sjógvurin upp á hálvar rútar í stýrihúsinum.

Maðurin, sum lá undir rulluni, er nú komin á føtur. Hann stendur í aftara parti av Neshamri, ið framvegis er undan. Tá reip verður kastað honum, kemst hann ikki við. Næstu ferð reipið verður kastað honum, tekur hann tað.

Neshamar stendur nú so nógv upp eftir enda, at maðurin í bátinum hevur reipið at draga seg upp aftur í rong. Endaliga verður tikið undir armar hansara og maðurin lyftur innanborða á Reynsmúla.

Í somu løtu maðurin kemur inn á dekkið, søkkur Neshamar.

Júst eftir bjargingina kallaði bátsførarin á Reynsmúla Tórshavn Radio yvir VHF. Samband varð ikki rokkið.

Bjargingarbáturin Ziska var ístaðin boðsendur umvegis fartelefon. Eisini varð ringt til bátsføraran á útróðrarbátinum Marnu, sum lá á Fuglafirði, at koma til hjálpar.

# Eftir tilburðin

Farið varð beinanvegin at sigla móti Fuglafirði. Eftir at Reynsmúli hevur verið ávegis í 20 minuttir er Ziska frammi. Av tí at Ziska siglir skjótari verður maðurin av Neshamri fluttur yvir.

Ziska kom á Fuglafjørð við manninum kl. 15:50. Hiðani bleiv maðurin fluttur á Landssjúkrahúsið við sjúkrabili.

Reynsmúli kom á Fuglafjørð kl.16:00.



*Bógvur Reynsmúlar eftir samanbrestin. Væl sæst, hvar Neshmar tók*

# Niðurstøða

Sjóvinnustýrið metir orsøkirnar til samanstoytin at verða:

**Reynsmúli**

1) Nøktandi kagtænasta varð ei havd.
2) Eftir kósbroyting varð ikki ansað eftir, at atgerðin hevði ynskta virknaðin.

*Eftir kósbroytingina á bakborð varð ikki ansað eftir gula glastrevjaplastbátinum.*

***Neshamar***

1) Nøktandi kagtænasta varð ei havd.

*Kag var hildið av dekkinum fram gjøgnum teir trýggjar miðrútarnar í stýrihúsinum, hetta við partvíst avmarkaðum sýni á bakborð.*

*Samstundis* varð *ruddað og vaskað.*

---------------------------------------------------------

*Úr "KUNNGERÐ NR. 90 FRÁ 25. MAI 2000 UM VAKTARHALD Á SKIPUM "*

*"Nøktandi kagtænasta skal havast samsvarandi 5. reglu í Altjóða Sjóreglunum, 1972, og skal tæna hesum endamálum:*

*At hava støðugt kaghald við at nýta sjón og hoyrn eins og allar aðrar miðlar, ið eru til taks so beinanvegin sæst, um vandar stinga seg upp,*

*At hava eina fullfíggjaða meting av støðuni og av vandanum fyri samanstoyti ella grunnstoyting og øðrum vandum fyri siglingini og*

*At varnast neyðstødd skip og flogfør, skipbrotin, vrak, rekar og aðrar vandar fyri siglingina".*

**Samanumtikið**

Um nøktandi kagtænsta varð havd –og Sjóreglarnir annars fylgdir, var hendingin helst ikki íkomin.

Soleiðis stendst hendingin helst av menniskjasligum mistøkum eina.

# Annað

Sambært sjófrágreiðingini minnist fólkið á Neshamri at kalla einki til hendingina. Soleiðis er fólkið helst fallið í óvit í sambandi við sjálvan samanstoytin.

Hetta samsvarar við, at bátsførarin á Reynsmúla sá fólk liggja undir rulluni, og seinni, at fólkið á Neshamri í fyrstu atløgu ikki gav sær far um, at reip varð kastað honum.

Drigið samanum kundi hendingin eins væl verið menniskjalívi at bana.

# Tilráðingar og krøv

1) -Nøktandi kag skal altíð verða hildið á sjógangandi fari.

Nøktandi kag er greinað út í Sjóreglunum (Colreg):

"I ethvert skib skal der altid holdes behørig udkig såvel ved brug af syn og hørelse som ved brug af alle forhåndenværende midler, der er hensigstmæssige under de foreliggende omstændigheder og forhold, således at der kan foretages en fuldstændig vurdering af situationen og af faren for sammenstød."

2) Kósbroyting at sleppa undan samanbresti, skal, um umstøðurnar loyva tí, gerast greitt og væl sjónligt. Hetta m.a. tí at:

-Hitt farið sær greitt og væl sjónligt at víkt verður
-Atgerðin er munadygg

Ein greið og væl sjónlig kósbroyting er í minsta lagi 40 stig.

3) Um umstøðurnar loyva tí, skal far ið víkir sigla afturum farið víkt verður fyri.

4) Virknaðurin av kósbroyting til tess at víkja, skal neyvt eftirmetast inntil hitt farið er leyst og liðugt.

5) Um umstøðurnar ei loyva nøktandi kósbroyting, skal ferðin hjá víkjandi farinum broytast til tess at halda víkiskylduna.

6) Far ið skal halda kós og ferð, skal ikki taka fyri givið, at hitt farið víkir, so sum fyriskrivað er. Í øllum førum skal neyvt verða ansað eftir, inntil støðan er greidd væl av.

Miðvágur 25.10.2011